# Próvtøka í samfelagsfrøði

Próvtøkan varir í 20 minuttir, íroknað próvdøming, og er í tveimum pørtum:

*1) Framløga av sjálvvaldum evni út frá framløguætlan*

*2) Samtala um próvtøkuspurning í kendum tilfari.*

***Framløga av sjálvvaldum evni út frá framløguætlan***

Próvhoyringin í sjálvvalda evninum varir í umleið 6-8 minuttir.

Framløgan snýr seg um, at tit svara upp á punktini/spurningarnar, sum tit hava skrivað í framløguætlanina.

Tit skulu hava framløguætlanina við til próvtøkuna og kunnu styðja tykkum til hana, men tit skulu ikki lesa alt upp orðarætt úr henni.

Tit kunnu hava tykkara egnu viðmerkingar við til próvtøkuna, men tað er ikki loyvt at lesa beinleiðis upp úr teimum.

Sjálv framløguætlanin telur ikki við í próvdømingini.

***Samtala um próvtøkuspurning í kendum tilfari***

Próvhoyringin í kenda tilfarinum varir í umleið 5-7 minuttir.

Hesin parturin av próvtøkuni er ein samtala millum tykkum og meg um próvtøkuspurningin í kendum tilfari, sum tit fáa við lutakasti.

Próvtøkuspurningurin er um annað av teimum báðum yvirskipaðu høvuðsevnunum, sum tit ikki hava valt sum sjálvvalt evni. Tey trý høvuðsevnini eru búskapur, politikkur og sosiologi.

Eingin fyrireikingartíð verður givin hendan partin av próvtøkuni.